## Seinasti heimadysturin hjá Zidane

Ein av heimsins bestu nakrantíð, Zinedine Zidane, takkaði fyri seg á Estadio Bernabeu, tá Real Madrid í ársins seinasta heimadysti spældi 3-3 móti Villareal.

Tá Zidane varð skiftur út í seinasta minuttinum reistust allir áskoðararnir, sum annars eisini høvdu sæð ein heilt undirhaldandi fótbóltsdyst. Ikki minst var fagnaðurin stórur, tá Zidane sjálvur stútaði Real Madrid á 2-2 miðskeiðis í seinna hálvleiki. Við javnleikinum vann Real Madrid seg upp á annað plássið í fremstu sponsku deildini.

**-mørk**



## Newcastle í Inter-Toto

Við einum 1-0 sigri á meistarunum úr Chelsea vann Newcastle seg akkurát somikið upp á talvuna, at liðið sleppur í Europa komandi heyst. Tað verður tó gjøgnum bakdyrnar, tí Newcastle noyðist at spæla Inter-Toto fótbólt, har høvuðsvinningurin eru trý atgongumerki til UEFE-Cup. Soleiðis eydnaðist Glen Roeder at flyta Newcastle heilt langt, eftir at hann tók við eftir sekkjaða Graeme Souness, men nóg mikið til fast starv í felagnum er tað tó neyvan. Hóast hetta er ynskið hjá Newcastle, so hevur Roeder ikki neyðugu pappírini at standa sum venjari í Premier League.

**-mørk**

# Mateitran spilti Tottenham-spælið

**Upp til tíggju spælarar høvdu búkilsku, tá Tottenham í seinasta umfarinum av Premier League mistu fjórða plássið, sum teir annars hava havt størsta partin av árinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Farvæl Highbury. Thierry Henry skoraði reint hat-trick í seinasta dystinum, sum Arsenal spældi á Highbury. Her fær svørðurin ein koss eftir triðja málið frá metmanninum hjá Arsenal* *Mynd: Reuters*

Síðani 3. desember hevur Tottenham hildi tí so týdningarmikla fjórða plássinum í ensku Premier League. Týdningarmikla, tí hetta gevur atgongd til lovaða pengalandið, sum Champions League so mangan verður rópt.

### Lógu slaktaðir

Undan seinasta leikdegi hevði liðið av White Hart Lane framvegis eitt stig niður til arvafíggindarnar úr Arsenal. Men við munandi betra málmuninum, sum Arsenal hevði, stóð greitt, at Tottenham skuldi fáa líka stóru úrtøku úr útidystinum á Upton Park móti West Ham, sum Arsenal fekk á heimavølli móti Wigan.

Ætlanirnar hjá Spurs fingu tó eitt stórt skot fyri bógvin longu sunnumorgunin. Helst var talan um ein mildan form av mateitran, men undir øllum umstøðum høvdu einir tíggju av spælarunum hjá liðnum búkilsku. Alt fyri eitt varð roynt at fáa týdningarmikla dystin útsettan, men hetta var tó sera trupult. Ikki minst, tí politikkurin altíð hevur verið, at á seinasta leikdegi skulu allir dystir spæla samstundis. Og tá boðini frá løgregluni so vóru, at dysturin í mesta lagi kundi flytast tveir tímar, helt Spurs-leiðslan, at so kundi dysturin tað sama verða spældur.

### Sheringham kundi søkt Spurs

Tað var eisini sjónligt, at West Ham var liðið, sum var betri fyri á degnum. Hóast Jermaine Defoe fekk javnað, eftir at Carl Fletcher hevði lagt West Ham á odda, so var tað mest sum alla tíðina við rygginum móti múrinum, at Tottenham spældi.

West Ham trýsti seg fram til alt fleiri møguleikar, og tað var líkt til, at Teddy Sheringham skuldi verða maðurin, sum sendi Tottenham út í myrkri. Júst felagið, sum Sheringham í so nógv ár skeyt so nógv mál fyri. Robinson bjargaði tó brotssparkinum, men eisini hann mátti geva skarvin yvir, tá ísraelsi Yossi Benayoun sendi bóltin í netið eftir hornaspark.

Og so kundi Marin Jol og hansara menn bara ásanna, at Tottenham gjørdust akkurát ov stuttir. Hóast talan er um eitt tað besta árið hjá felagnum í eini 20 ár, so gjørdist talan um vónbrot, nú plássið í pengamaskinuni hjá UEFA gjørdist av ongum. At talan so kortini verður um europeiskan fótbólt, er helst eitt stórt plástur á sárið, men á inntøkusíðuni kann UEFA-Cup á ongan hátt viga ímóti Champions League.

### Henry sløkti á Highbury

Hóast Tottenham soleiðis tapti, so hevði Arsenal eisini sítt arbeiði at gera. Á seinasta dystinum hjá felagnum nakran á Highbury var setningurin, at Arsenal skuldi fáa í minsta lagi eitt stig meira enn Tottenham. Ein setningur, sum við 4-2 á Wigan so væl og virðiliga varð rokkin.

Sigurin var í sjálvum sær nakað, sum Arsenal-fjeppararnir høvdu alla orsøk at fegnast um, men løtan var tó serliga kensluborin, nú hetta eisini var seinasti dysturin hjá felagnum á Highbury. Í fleiri ár hevur verið arbeitt við nýggjum stadion-ætlanum, og tá farið verður undir nýtt kappingarár, verður hetta gjørt á spildurnýggja Emirates-Stadion.

Gjøgnum ár og dag hevur Arsenal átt nógvar stórar spælarar. Men fáur teirra man tó hava verið eins stórur, sum Thierry Henry hevur verið tað seinnu árini. Maðurin, sum í ár tók metið frá Ian Wright sum mest skorandi í Arsenal nakrantíð, gjørdist eisini heilt stóra stjørnan á seinasta Highbury-dystinum hjá felagnum. Ein dystur, tann seinasti fyri Arsenal í Premier League, nú tað ljóðar, at Barcelona vil hava spælarar til sín.

Eftir at Wigan hevði lagt seg á odda 2-1, gjørdi Henry nevnliga reint hat-trick. Og so fingu søguskrivararnir enn eina góða orsøk at seta 14-talið í ævigu søguskrivingina hjá Arsenal.

## STUTT SAGT



## Ruud liðugur

Nógvi slaturin kring framtíðina hjá Ruud van Nistelrooy fekk eyka nógva ferð á sunnudagin. Sir Alex Ferguson hevði nevnliga gjørt av, at ungi Giuseppe Rossi skuldi byrja í álopinum saman við Louis Saha. Seinastu tíðina hevur tað elvt til gitingar um framtíðina hjá Nistelrooy, at Saha er tikin framum, tá liðið hjá United hevur verið sett. Hóast hollendingurin aftur í ár gjørdist toppskjútti hjá liðnum við 21 málum, so er hetta eftir øllum at døma ikki nóg mikið hjá Sir Alex, sum eftir dystin málbar seg soleiðis.

Tað hava verið nakrar hendingar seinastu vikuna, sum fingið meg at ivast í hugburðinum í felagnum. Og til ein somikið týdningarmiklan dyst helt eg bara, at Ruud ikki skuldi vera á liðnum.

Sjálvur fór Nistelrooy beina leið av Old Trafford, tá uppstillingin var kunngjørt, og nú verður roknað fyri víst, at hann ikki verður í Manchester United, tá farið verður undir næsta kappingarár. Hópin av europeiskum stórfeløgunum tykjast eisini vera til reiðar at opna pengapungin, soleiðis at stórskjúttin kann skifta felag.

United vann annars dystin móti Charlton við 4-0, og vissaðu teir sær harvið silvurmerkini í Premier League. Louis Saha skeyt fyrsta av málunum hjá reyðu devlunum.

**-mørk**

## FAKTA

**ÚRSLIT, PREMIER LEAGUE**

| | |
|---|---|
| Arsenal-Wigan | 4-2 |
| Everton-WBA | 2-2 |
| Portsmouth-Liverpool | 1-3 |
| Aston Villa-Sunderland | 2-1 |
| Fulham-Middlesbrough | 1-0 |
| West Ham-Tottenham | 2-1 |
| Blackburn-Man City | 2-0 |
| Man Utd-Charlton | 4-0 |
| Bolton-Birmingham | 1-0 |
| Newcastle-Chelsea | 1-0 |